Ábyrgdaraval í Suðuroyar Sparikassa

» Hevur pinkulingatilveran nakran møguleika í einum heimi av risum«, verður spurt, tá Suðuroyar Sparikassi fríggjakvøldið 28. mars hevur ábyrgdarafundur í VB-húsinum í Vági við borðhaldi, undirhaldi, skemti, tónleiki og sangi

ÁBYRGDARAFUNDUR
Eirikur Lindenskov

Um fáar dagar verður nýtt umboðsráð valt í Suðuroyar Sparikassa, sum telur 29 fólk. Umboðsráðið velur síðani umsjónarráðið, sum er hægsti myndugleiki sparikassans.

Valið fer fram í avgreiðslum Suðuroyar Sparikassa frá mánadegnum 24. mars til og við fríggjadagin 28. mars.

Suðuroyar Sparikassi er ein lokalur peningastovnur, sum tó seinnu árini hevur valt at víðka virksemið soleiðis, at peningastovnurin eisini hevur deild í Havn.

Umframt at taka ímóti innláni, so hevur sparikassin lænt út móti trygd í fastari ogn. Hesi seinastu árini hevur sparikassin eisini verið við í figging av virkjum, skipum, bilum o.ø.

– Sum minsti peningastovnur í landinum, so leggur sparikassin áherðslu á at vera hin persónligi stovnurin, har bæði starvsfólk og kundar kunna merkja, at tey ikki føla strongd í kundatænastuni frá okkum, sigur Per Jacobsen, marknaðarleiðari í Suðuroyar Sparikassa.

Við fýra ára millumbili stílar Suðuroyar Sparikassi fyri fundi fyri ábyrgdarunum. Hesin ábyrgdarafundur verður fríggjakvøldið 28. mars.

Á fundinum fáa ábyrgdarar høvi til at velja frá kl 18:30 til 19:30. Síðani verður boðið vælkomin og fer so formaðurin í Sparikassanum, Lars Djurhuus, at kunna um virksemið hjá sparikassanum. Eftir formannin fer Mikkjal Sørensen, stjóri, at kunna um roknskapin.

Sum fastur táttur á skránni er gestarøðari, og verður gesturin hesaferð Gestur Hovgaard, granskari, sum fer at tosa um evni: »Hevur pinkulingtilveran nakran møguleika í einum heimi av risum«.

Aftan á fyrilesturin verður borðhald. Undir borðhaldinum verður undirhald við skemti, tónleiki og sangi. Fyri undirhaldinum standa Robert McBirnie og teir.

Áðrenn fundurin endar verður úrslitið av valinum kunngjørt.

Deildin hjá Suðuroyar Sparikassa í Havn lat upp í 1998. Sparikassin hevur høvuðssæti í Vági umframt eina deild í Porkeri

Mikkjal Sørensen er stjóri í Suðuroyar Sparikassa

Kappingin um ársins songrødd byrjar

ÁRSINS SONGRØDD

Leygarkvøldið í næstu viku byrja innleiðandi umførini til Ársins songrødd. Fyrsta kappingin verður í Badmintonhøllini í Havn 29. mars kl 23.

Mark Joensen, sum er ein av fyrireikarum sigur, at flestu støðini longu eru fullteknað men at enn eru pláss eftir í Suðuri, Klaksvík og í Vágunum. Hann sigur, at fólk kunnu tekna seg á www.songroddin.com.

Higartil hevur tað bara verið vinnarin, ið hevur fingið vinning, men hetta er nú broytt soleiðis, at nummar tvey og trý fáa ávikavist 5.000 og 3.000 krónur. Vinnarin av kappingini fær umframt heiðurin 10.000 krónur.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum at okkara høgt elskaði pápi, verpápi, abbi og langabbi

Hans Andreas Heinesen
vanliga nevndur Dia í Hoygarðinum

fyrrverandi vrakari, Toftir, andaðist á Røktar- og Ellisheiminum í Runavík 16. mars, 90 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Fríðrikskirkjuni hósdagin kl. 14.00.

Familjunnar vegna
Børnini

Tey, sum vilja minnast Dia, kunnu lata eina gávu til Eldrasambýlið á Toftum.

Sama útboð sum aðrir

Hjá okkum sleppa fólk undan at kenna seg sum totalkunda, sigur Per Jacobsen, marknaðarleiðari í Suðuroyar Sparikassa

ÁBYRGDARAFUNDUR
Eirikur Lindenskov

– Suðuroyar Sparikassi hevur sama útboð sum aðrir peningastovnar.

Hetta sigur Per Jacobsen, marknaðarleiðari í Suðuroyar Sparikassa. Hann sigur, at sparikassin leggur dent á persónligan samrøðuna við kundan.

Í 1998 lat Suðuroyar Sparikassi upp deild í Havn, og hevur deildin verið sera væl móttikin, sigur Per Jacobsen, sum heldur, at fleiri kundar fegnir vilja hava við ein lítlan peningastovn at gera – ein stovn, har viðskiftafólkini sleppa undan at kenna seg sum »totalkunda« hjá peningastovninum.

Suðuroyar Sparikassin varð stovnaður hin 1. oktober í 1943 og kann tí í ár runda 60 ára stovningardagin.

Stjóri í Suðuroyar Sparikassa er Mikkjal Sørensen, deildarileiðari í Havn er Jóannes S. Hansen.

Í sparikassanum starvast 20 fólk, har av seks teirra eru á deildini í Havn, eitt á deildini í Porkeri og 13 í høvuðsdeildini í Vági, har eisini stórin hevur sítt sæti.

The Grand Old Man í sparikassaheiminum, Per Jacobsen, er marknaðarleiðari í Suðuroyar Sparikassa

Væl vitjað framsýning

Grótlampurnar hjá Eyðuni Dal-Christiansen hava vakt stóran áhuga millum fólk, sum nýttu høvi at støkka inn á gólvið, tá hann sýndi fram í Smiðjuni um vikuskiftið

FRAMSÝNING
Mynd: Jens K. Vang

Nógv fólk vóru á gólvinum í Smiðjuni í Lítluvík um vikuskiftið, tá Eyðun Dal Christiansen hevði framsýning av nógv umrøddu grótlampunum, sum hann hevur gjørt.

Framsýningin var skipað á tann hátt, at áskoðarin fekk innlit í, hvussu Eyðun arbeiðir, og hvussu hugskotið til serføroysku lampurnar eru íkomið. Høvið var at síggja arbeiðið frá rávøru til úrslit. Frá gróti til lampu.

Nógv gjørdu sær dælt og komu at práta við Eyðun, meðan hann greiddi frá, hvussu hugskotið sá ljósið. Lampurnar eru sermerktar. Umleið hundrað steinar eru í hvørjari lampu, sum tilsamans tekur um 50 til 60 tímar at gera. Eyðun brúkar vinkulslipari til steinarnar, og serliga lampurnar, sum hava skeivar vinklar eru hugtakandi, tí tær eru álíkar standmyndum.

Grótið, sum Eyðun brúkar, er handtikið í Porkeri. Sjálvur heldur Eyðun, at tað grótið í Suðuroy er sjáldsama vakurt, og sett saman gevur føroyskt grót eitt spennandi litspæl, sum serliga kemur til sín rætt, tá væta kemur á.

Eyðun hevur áður havt tvær framsýningar av málningum, men hetta var fyrstu ferð, at hann hevði ein framsýning av grótlutum, sum hann hevur fingist við síðstu árini.

Eyðun Dal Christiansen hevur fingið hugskotið til sínar lampur, meðan hann hevur fingist við at laða garð og gera grótlutir heima hjá sær sjálvum. á myndini sæst ein garður, sum hann nýliga hevur gjørt í urtagarði í Havn

Høsnarungin hjá Restorffs



Tað var vár í Havn og sól og páskaliljur og ordiligs deiligt. Fitti, guli høsnarungin og hálvbeiggi hansara, hin góði Vargurin fóru spákandi. **"Tú, Vargur veiss dú hvat"** segði høsnarungin **"Kom út til Restorffs og keyp sodavatn til mammu, hon elskar Sisu og Assu á páskum"** **"Jaja"** knurraði Vargurin. **"gott til hálsin"**.

Úti á Landavegnum stóð ein gomul kona við einum P-dag skelti í hondini. **"Hvar fara tit"** segði hon við ullintum máli. **"Vit fara til Restorffs"** segði høsnarungin **"men hví hevur tú so snødiga reddi og luktar sum seyður, og hví hevur tú kleyvar ístaðin fyri fótur, ha ??"**. **"Tað er tí eg eri presenil"** segði konan **"Men komið tit heldur við mær út í Havnardal og fái hvíla til Páskar"**. **"Hatta er Veðrarin"!!!!** rópti Vargurin **"passa uppá, hann hevur forklætt seg sum ein kona, hann er djóralokkari"** Og so leyp Vargurin á Veðrin og beit hann í sjógvið **"Slepp tær sorðurafturi"** segði hann við Veðrin, sum fór fratørur, haltandi og sparlandi við P skeltinum.

"Góðan dagin, litlu vinir, komið innar" segði stjórin hjá Restorffs . Hann rósti Varginum fyri bragdið og gav honum ein skarv at gnaga. Stjórin helt at høsnarungin var so fittur at nú skuldi hann koma at búgva hjá Restorffs í einum Gull-húsi og á **Várjavndegi tann 21. mars** skulu øll í Føroyum minnast til tann fitta høsnarungan hjá Restorffs.

Restorffs stjórin var ordiliga cool og góður við børn og fortaldi at **"Nú fer Restorffs at gera ein nýggjan cola og tá skulu øll børn í Føroyum koma út til Restorffs at fáa ein ókeypis cola"**. **"Hurra"** rópti høsnarungin og fekk sær upp í nevið **"Tú er tann fittasti bryggjarin í Føroyum."**

Restorffs
– vit elska børn og djór –